gult cyan magenta svart



# Einki uppskot er komið til FSF

**Í fjør gjørdi fótbólts aðalfundurin av, at uppskot til nevndarlimir skuldu vera á FSF skrivstovuni í seinasta lagið tíggju dagar undan aðalfundinum. Tíggju dagar undan aðalfundinum, sum verður leygardagin, var einki uppskot komið**

AÐALFUNDUR
*Jóannes Hansen*



*Jógvan Arge hevur higartil verið fastur orðstýrari á aðalfundinum, men í ár liggur ikki fyri hjá honum. Christian Andreasen verður nýggjur orðstýrari*

Tað skal ikki bera til soleiðis hissini á sjálvum aðalfundinum at koma við uppskotum um, hvør ella hvørji skulu manna nevndina í Fótbóltssambandinum. Hetta var breið semja um á aðalfundinum fyri einum ári síðani, og tí varð grein sjey í ásetingunum fyri Fótbóltssambandið broytt, soleiðis at hon m.a. sigur, at uppskot um val til nevndina skulu vera FSF í hendi í seinasta lagi tíggju dagar fyri aðalfund.

Fyrsti aðalfundurin eftir hesa broytingina í ásetingunum verður nú leygardagin. Tað vil siga, at uppskot um nevndarlimir skuldu verið FSF í hendi mikudagin í síðstu viku.

Tað eru limafeløgini sum saman við nevndini í FSF hava rætt at koma við uppskotum um fólk at manna nevndina. Mikudagin í síðstu viku var freistin úti, og tá var einki uppskot um nevndarlimir komið á FSF skrivstovuna.

Hesa ferð standa tríggir limir fyri vali. Teir eru næstformaðurin Børge B. Hansen og nevndarlimirnir Óli Holm og Jens Erik Magnussen. Sambært skrivinum til feløgini um aðalfundin, sum er dagfest 8. februar, verður sagt, at teir omanfyri nevndu taka við afturvali. Men tá vit fregnaðust hjá aðalskrivaranum í FSF, um nakar hevði skotið teir omanfyri nevndu ella kanska onkran annan upp til nevndarlim, so var svarið nei.

– Tað var nevndarfundur eftir at freistin at koma við uppskotum var farin. Tá varð staðfest, at einki uppskot var innkomið. Nevndin hevði ikki skotið nakran upp, og einki av limafeløgunum hevði latið við seg koma.

Hetta sigur Ísak Mikladal, sum er aðalskrivari í Fótbóltssambandinum.

FSF hevur í skrivi til feløgini 4. og 15. januar boðað til aðalfundar, aðalfundurin var eisini kunngjørdur á fundi við feløgini 20. januar, og lýsing um aðalfundin hevur verið í bløðunum. Fjórða punktið á skránni er at velja nevndir og varalimir. Tað skulu vera tveir varalimir. Teir verða valdir fyri eitt ár í senn. Í fjør varð bara ein varalimur valdur. Tað var Sveinbjørn Danielsson í Hvalba.

Men hvussu verður við nevndarvalinum leygardagin?

– Nevndin staðfesti á fundinum í síðstu viku, at einki uppskot var innkomið, tá tíggju daga freistin var farin. Tí verður tað ivaleyst upp til aðalfundin at gera av, hvussu tað skal farast fram í sambandið við nevndarvalið, heldur Ísak Mikladal.

### Oftast friðarligt

Umframt teir tríggjar, sum standa fyri vali hesa ferð, manna fýra aðrir nevndina í FSF. Teir eru Torleif Sigurðsson, formaður, Dánjal Andreasen, Jákup Simonsen og Karl Vidtfeldt. Hesir vórðu allir afturvaldir uttan mótvalevni á aðalfundinum fyri einum ári síðani. Teir standa fyri vali aftur á aðalfundinum um eitt ár.

### Drúgvir í sessunum

Felags fyri nevndarlimirnar í Fótbóltssambandinum er, at teir hava verið í nevndini í mong ár. Næstformaðurin, Børge B. Hansen, var í fótbóltsnevndini í ÍSF og kom í fyrstu nevndina, tá Fótbóltssambandið varð sett á stovn í 1979.

Tað kemur so at siga ikki fyri, at onnur valevni verða skotin upp enn teir, sum standa fyri afturvali. Einasta undantakið nógvu tey seinastu árini var í fyrraárið. Tá vóru tvey uppskot til næstformanssessin. Mortan Poulsen varð stillaður upp ímóti Børga B. Hansen, og tað var rættuligur dramatikkur undir uppteljingini. Tá ein atkvøða var eftir í hattinum stóð á jøvnum. Síðsta atkvøðan var til Børga B. Hansen, sum tískil var afturvaldur.

Merkisvert á aðalfundinum fyri tveimum árum síðani var tað, at atkvøðan hjá nevndini í FSF var blonk. Formaðurin, Torleif Sigurðsson, segði, at hann hevði atkvøtt blankt, tí hann vildi ikki taka dagar ímillum Børga B. Hansen og Mortan Poulsen.

### Nýggjur orðstýrari og nýggjur karmur

Jógvan Arge hevur verið orðstýrari á øllum aðalfundunum hjá Fótbóltssambandinum. Hesa ferð liggur tað ikki fyri hjá roynda útvarpsmanninum. Men alt bendir á, at fundurin kortini fer at vera í góðum hondum. Vit hava skilt, at nevndin í FSF ætlar at skjóta upp, at Christian Andreasen, advokatur, verður orðstýrari leygardagin.

Nógvu tey seinnu árini hevur fundurin verið í Norðurlandahúsinum, men hesa ferð verður fundurin í Útvarpshøllini. FSF og feløgini hava verið stak væl nøgd við Norðurlandahúsið, sum hevur verið mett sum tignarligur karmur um aðalfundin. Men hesa ferð bar tað ikki til at finna ein dag, sum bæði passar húsinum og fótbóltinum.

# Færri greinar og longri freist

**Einasta uppskotið, sum er á skránni til FSF aðalfundin leygardagin, er ein nýggj orðing av kappingarreglunum**

AÐALFUNDUR
*Jóannes Hansen*

Samskiftið millum nevndina og umsitingina hjá FSF og fótbóltsfeløgini gongur fyri seg alt árið. So títt og knapt sum kappingarnar á vøllunum eru farnar afturum, so verður sjøtul settur á fyrireikingarnar til nýggja fótbóltsárið. Hetta verður gjørt við atliti til royndirnar frá farna árinum.

At samskiftið á nógvum økjum tykist vera gott sæst aftur í, at nógvir spurningar verða greriddir á øðrum fundum enn á aðalfundinum. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað ikki nýtist at merkja, at fótbóltspolitikkurin liggur í fasta svøvni, tá bara eitt mál er innkomið til aðalfundin, sum verður leygardagin.

Málið, sum er á skránni, er stórt, og tað hevur verið arbeitt við tí allan vetur. Tað snýr seg um kappingarreglurnar fyri fótbólt. FSF eigur uppskotið, sum ber heitið broytingar/endurskoðan.

Reglurnar, sum higartil hava verið galdandi, hava fevnt um 45 greinar. Nýggja uppskotið fevnir um 42 greinar.

At greinatalið er lækkað kemst av, at í nýggja uppskotinum verður lagt upp til, at einstøk viðurskifti, sum áður hava staðið í reglunum, nú eru løgd til FSF at gera av. Eitt nú hevur tað áður staðið í kappingarreglunum, hvussu stór samsýningin skal vera hjá dómarunum og hjálpardómarunum. Nú verður sagt, at »FSF ásetur í reglugerð, fyri eitt ár í senn, samsýningina til dómarar, hjálpardómarar og møguligar útnevndar eygleiðarar«.

### Freistin longd

Á aðalfundinum í fjør varð nógv tosað um evsta markið fyri at skifta felag. Tá varð í broyting til reglurnar sligið fast, at tað ikki skuldi bera til at skifta úr føroyskum og útlendskum felag og í eitt annað føroyskt felag, um umsókn ikki varð latin kappingarnevndini um hetta í seinasta lagið 28. juli. Í fjør tulkaði FSF nýggju ásetingina soleiðis, at hetta hevði við sær, at tað ikki bar til at skifta felag eftir summarfrítíðina.

Í nýggja uppskotinum er freistin broytt eitt lítið sindur. Ivaleyst eru bæði feløgini og tey í Fótbóltssambandinum komin eftir, at tað ikki hevur verið serliga heppið, at evsta markið hevur verið ólavsøkuaftan. Ofta hevur tað víst seg, at stórt virksemi hevur verið upp undir evstamarkið. Tað vil við øðrum orðum siga, at hetta hevur órógvað ólavsøkuhaldið hjá spælarum, feløgunum og serliga hjá teimum í FSF. Í uppskotinum, sum feløgini skulu taka støðu til leygardagin, verður skotið upp, at evsta markið fyri flyting millum feløg í Føroyum og úr útlendskum feløgum og í føroysk feløg verður 5. august.



*Aðalfundurin hjá FSF skal um vikuskiftið taka støðu til uppskotið um broyttar kappingarreglur fyri fótbóltin*



# Landsliðið til Cadiz

**Allan Simonsen hevur boðað frá, hvørjar 20 leikarar hann hevur tikið út til venjingarleguna hjá landsliðnum, sum verður í Cadiz, Spania, um tvær viku**

FÓTBÓTLSLANDSLIÐ
*Jákup Mørk*

Eins og vanligt hevur verið, fer føroyska A-landsliðið í fótbólti aftur í vár á venjingarlegu í Spania.

Venjingarlegan í ár verður í Cadiz, og verða leikararnir burturstaddir í tvær vikur. Frá 23. februar til 4. mars.

### Liðskiparin ikki við

Landsliðsvenjarin, Allan Simonse, hevur tikið út 20 leikarar til ferðina, og sum so eru ikki tær stóru broytingarnar í mun til seinastu ferðirnar, landsliðið hevur verið saman.

Merkisvert er tó, at vanligi liðskiparin, Jens Kristian Hansen, framhaldandi ikki er tøkur at spæla. Hann hevur leingi drigist við ein skaða í stórutá, og er í vetur skurðviðgjørdur fyri hetta. Tað hevur tikið sína tíð at fingið rætta skaðan upp aftur, og millum annað hevur liðskiparin verið gipsaðu í 8 vikur, meðan nakrar skrúvur hava hildið tánni í rættari støðu.

Enn er hann so ikki førur fyri at fara undir krevjandi uppgávurnar við landsliðnum, men einki er at ivast í, at landsliðsvenjarin vónar at hava liðskiparan tøkan, tá farið verður í holt við undankappingardystirnar í mars mánaði. Jens Kristian fær tó ikki verið við til dystin móti Luxemburg, orsakað av reyða kortinum, sum hann fekk móti Sveis, men tá dyturin móti Russlandi er á skránni fýra dagar seinni, er hann tøkur.

### Teir 20

Harumframt framgongur eisini av hópinum, at bæði Arnbjørn Danielsen og Jákup á Borg eru tiknir beinleiðis út til hópin. Á ferðini til Svøríkis her fyri vórðu báðir tiknir út eftir avboð frá øðrum leikarum, men fyri báðar var galdandi, at teir vórðu noyddir at senda avboð, tí skotbráðið var somikið stutt til fráferðina.

Hópurin, sum Allan Simonsen hevur tikið, sær annars soleiðis út: Øssur Hansen, Fróði Benjaminsen, Hans Fróði Hansen, Arnbjørn Danielsen, B68, Rógvi Jacobsen, KÍ, Jóhannis Joensen, Allan Mørkøre, Andrew av Førum, HB, Christian Høgni Jacobsen, NSÍ, Jákup á Borg, B36, Uni Arge, Akranes, Jens Martin Knudsen, Sámal Joensen, John Petersen, Leiftur, Pól Thorsteinsson, Valur, Jákup Mikkelsen, Herfølge, Súni Olsen, FC Zwolle, Johan B. Hansen, OB, Kurt Mørkøre, Sogndal, Todi Jónsson, FCK. Harumframt verða Allan Simonsen, landsliðsvenjari, Jógvan Martin Olsen, hjálparvenjari, Jens Pauli Marstein, lækni, Álvur Hansen, fysioterapeutur og Heðin Askham, liðleiðari, eisini við á ferðini



*Mynd av Jens Kristian*
*Jens Kristian Hansen hevur nýtt vetrarsteðgin til at rætta stórutánna uppaftur, og enn er hann ikki til reiðar at fara í holt við landsliðsfótbóltin*

# Klaksvíkin skal hoyrast



*Tey hjá Mjølni vóna, at nógvir klaksvíkingar fara at stuðla liðum sínum í teimum báðum steypafinalunum leygardagin*

**Í eini roynd at draga nógvar klakvíkingar til steypafinalurnar í flogbólti, verður skipað fyri bussferð til Havnar leygardagin**

STEYPAFINALUR
*Jákup Mørk*

Skal nakað ávíst pláss í landinum peikast út sum sonevndur maktdepul í flogbólti, er einki at ivast í, at Klaksvíkin stendur frammaliga í røðini. Annað árið á rað eru bæði kvinnur og menn at finna í steypafinaluni, og bæði skulu tey verja heitið frá í fjør, tá farið verður á vøllin.

Tá liðini spældu finaludystirnar í fjør, vóru heilt væl av áskoðarum komnir úr Klaksvíkini, og í ár ætlar felagið at gera sítt til, at talið so avgjørt ikki verður lægri hesaferð.

### Ókeypis bussferð

Mjølnir hevur nevnliga gjørt av at skipa fyri bussferð til Havnar, soleiðis at ferðingin aftur og fram skal gerast so ómaksleys sum til ber fyri áskoðararnar, og harumframt verður rómurin av áskoðarunum ofta betri, tá nógv eru í ferðalagnum.

Fyri at gera tilboðið so lokkandi sum gjørligt, skulu áskoðararnir als ikki rindað fyri bussin. Kravt verður bert, at vaksin rinda tær 50 krónurnar, sum atgongumerki til finaluna kosta, meðan børn sleppa ókeypis við.

Fyri at vita, hvussu nógvum fólkum rúmd skal vera fyri, er tó neyðgut, at tey, sum ætla sær við, boðað felagnum frá. Frá Mjølni hava vit fingið at vita, at hetta eigur at verða gjørt á tlf. 281890.

Fyrri finaludysturin – tann hjá kvinnunum – byrjar klokkan 14.30, og tí hava klaksvíkingarnir gjørt av, at farast skal um Leirvíksfjørð klokkan 10.30.

# Grand-Prix í billard

**Seinasta umfarið undan finaluni í Grand-Prix kappingini í billard varð leikt um vikuskiftið, og hesa ferð var Shell høvuðsstuðul fyri tiltakinum**

BILLARD
*Jákup Mørk*

Føroysku billardfeløgini hava í vetur roynt seg í sonevndari Grand-Pric kapping. Seinasta umfarið undan sjálvari finaluni varð leikt um vikuskiftið, og komandi vikuskiftið verður so farið undir endaspælið. Hetta verður í Havnar Klubba, og byrjað verður longu leygarmorgunin.

Úrslitini hetta umfarið vóru annars soleiðis:

| nr. | felag | stig | miðal |
|---|---|---|---|
| 1 | TvøroyraBillardfelag | 14 | 22,30 |
| 2 | Vágs Billardfelag | 12 | 22,08 |
| 3 | Havnar Klubbi | 8 | 18,27 |
| 4 | Klaksvíkar Klubbi | 6 | 18,41 |
| 5 | Fuglafjarðar Klubbi | 0 | 11,38 |

Størstu einstøku seriuna átti Birgir Jacobsen úr Vágs Billardfelag, tá hann fekk ikki færri enn 182 eygu.

# Armarnir skulu niður

**Báðir steypavinnararnir í hondbólti skulu longu í kvøld á vøllin í landskappingardysti**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Kvinnurnar hjá VÍF verða kanska nakað moyrar, tá tær í kvøld fara á vøllin fyri fyrstu ferð síðani steypafinaluna.

Enn er tó ikki rúmd hjá teimum til at lata veistlurómin standa við, tí hóast tær longu hava tryggjað sær Coca-Cola steypið, so er einki at ivast í, at tær eisini vilja hava hendur á steypinum, sum Føroya Tele letur vinnaranum av landskappingini.

Higartil hevur alt gingið upp á stást í so máta, og einki er, sum bendir á, at kvinnurnar hjá Sóljuni skulu kunna forða teimum í hesum.

Dysturin verður leiktur í Vestmanna kl. 18.00.

### StÍF aftur til Havnar

Steypavinnararnir hjá monnunum, StÍF, skulu eisini á vøllin at royna seg í kvøld, tá teir aftur skulu traðka á gólvið í Ítróttahøllini á Hálsi í Havn.

Mótstøðuliðið hesa ferð er H71, og á pappírinum eigur hetta í øllum førum at vera ein yvirkomulig uppgáva hjá strandingunum. Ein av fortreytunum fyri sigri er tó uttan iva, at strandingarnir nú hava fingið armarnar niður eftir flotta avrikið í finaluni.

Finna teir sama spæl fram aftur, er einki at ivast í, at ein talan verður um tryggan sigur, men tað hevur ofta fyrr vist seg, at tað kann verða so sum so við motivatiónini beint eftir vunnan finaludyst.

Dysturin verður á Hálsi kl. 19.45.